# – Gongdin hjá okkum er vend!

**So bersøgin er venjarin hjá B68, Bill McLeod Jacobsen, eftir dystin á Argjum í gjár. B68 vann uppiborið 2-1 á botnliðnum AB, sum hevði eitt sera umskipað lið**



AB STRÍÐIST FYRI LÍVINUM



Tróndur Arge

Hetta var dysturin, ið kundi hála B68 heilt niður í botn- og niðurflytingarstríðið, men eisini dysturin, ið endaliga kundi hála B68 úr botn- og niðurflytingarstríðnum. Hóast Bill McLeod Jacobsen ikki endaliga vil avskriva, at teir eru úr niðurflytingarvandanum, so talar stigatalvan sína søk. AB hevur 10 stig á einum deildum aftasta plássi, meðan B68 nú er komið upp á sjeynda pláss við 18 stigum.

– Eg vóni, at hetta er endin hjá okkum í botnstríðnum, men hetta er einki garanti fyri nakað sum helst. Vit vita eisini, at vinnur B71 ein dyst, ella AB vinnur tveir dystir, so eru vit í somu støðu sum áðrenn hendan dystin. Fýra teir komandi dystirnir hjá okkum eru ímóti EB/Streymi, NSÍ og tvær ferðir HB, so vit hava nógv at síggja til, sigur Bill McLeod Jacobsen

## Dreymabryjan

AB fekk annars eina dreymabyrjan. Tá bara tveir minuttir vóru leiktir, sendi Nikolej Eriksen skjóta framherjan Jákup Dam avstað. Hann rann frá verjuni og fram við málverjanum hjá B68, og setti bóltin í eitt tómt mál. Liðið hjá AB var næstan ikki at kenna aftur frá onkrum av hinum dystunum. Rói Danielsen spældi á sínum vanliga plássi í miðverjuni, meðan Alex Mellemgaard var fluttur á høgra bakk, men Tummas Justinussen var fluttur av miðjuni aftur í miðverjuna. Nýggjur maður á vinstra bakki varð Yohan Andrés Borðoy.

– Eg hugsaði ikki so nógv, tá Jákup Dam legði teir á odda beinanvegin. Tað eru komin nógv skjót mál í seinastuni og vit vistu, at tað kundi henda. Vit tosaðu so seint sum í skiftingarrúminum undan dystinum, at AB hevði hendan óvanliga skjóta framherjan og menn vóru klárir upp á hann, men hann rann so frá okkum álíkavæl, sigur Bill Jacobsen.

## B68 svara aftur

Tað gingu bara tríggir minuttir, so høvdu toftamenn javnað við góðum skoti frá Kristian Antoni Andreasen. Hann fekk bóltin stutt uttan fyri brotssteigin í høgru og smekkaði til. Bólturin fór í handara mál horn – eitt vakurt mál.

Tá tað manglaðu tíggju minuttir av fyrra hálvleiki kom avgerandi málið. Eftir innkast úr høgru ferðast bólturin runt í AB brotssteiginum. Mitt í tí heila endar bólturin hjá Ahmed Keita, sum við rygginum til málið smekkar til við vinstra beini. Bólturin fer umvegis ein argjamann í mál. Enn eitt vakurt mál frá B68.

– Vit spæla ein sterkan og góðan fyrra hálveik, har vit uppiborið eru omaná. Megna vit at spæla fleiri hálvleikir, sum vit gjørdu í fyrra hálvleiki, so fáa vit nógv stig aftrat í hesi kappingini, staðfestir Bill.

## Óruddiligur seinni hálvleikur

Seinni hálvleikur gjørdist ikki eins spennandi. B68 leikararnir vóru nøgdir við støðuna, meðan argjamenn ikki megnaðu at seta gestirnar undir stórvegis trýst.

– Seinni hálvleikur var eitt órudd av eini aðrari verð, har vit ikki spældu nóg væl. Um seinni hálvleikur er støðið fyri restina av kappingini, so fáa vit tað trupult, sigur Bill M. Jacobsen.

## Hart arbeiði fyri framman

B68 hevur nú hálað seg úr botninum og niðurflytingarstríðnum, men tað er langt upp til tey næstu liðini á stigatalvuni.

– Nú liggur hart arbeiði fyri framman, um vit skulu røkka liðunum framman fyri okkum. Vit hava EB/Streym komandi dyst og tað er

**AB - B68 1-2 (1-2)**
**1-0: Jákup Dam, 2.**
**1-1: Kristian Anton Andreasen, 4.**
**1-2: Ahmed Keita, 34.**
Dómari: Dagfinn Olsen

**AB:** Heðin Stenberg – Alex Mellemgaard, Tummas Justinussen, Rói Danielsen(Sjúrður Ellefsen 69.min), Yohan Borðoy(Dion Splidt 45.min) – Ingvard Vang(John Hansen 60.min), Jobin Drangastein, Evrard Blé, Rasmus Nielsen – Nikolaj Eriksen og Jákup Dam
***Gult kort:*** Rói Danielsen, Evrard Ble, Rasmus Nielsen
***Á bonkinum uttan at koma inn:***
Thomas Juul Thomsen og Tróndur Sigurðsson
**B68:** Petur Meinhard Magnussen – Poul N. Poulsen(Jónleif Højgaard 67.min), Oddur Højgaard, Jóhan Dávur Højgaard, Øssur Hansen – Niclas Joensen(Jóhan Petur Poulsen 33.min), Ndende, Remi Langgaard(Eli Simonsen 77.min), Pól Jóhannus Justinussen – Ahmed Keita og Kristian Anton Andreasen
***Gult kort:*** Niclas Joensen, Remi Langgaard
***Á bonkinum uttan at koma inn:***
Vlada Filipovic og André Olsen.




## – Hetta havi eg ongantíð uppliva fyrr!

**Soleiðis segði Heðin Stenberg eftir dystin um støðuna við verjuni, sum var umskipað upp til fleiri ferðir gjøgnum dystin**

– Eg havi ongantíð upplivað hetta fyrr. Umframt umskipaðu verjuna frá byrjanini, so spældu Dion Splidt og eisini Sjúrður Ellefsen á høgra bakki og eisini John Hansen kom í miðverjuna. Tað var spell, at Rói Danielsen skuldi blíva skaddur. Vit mangla Tehe Aristide í miðverjuni, sigur málmaðurin hjá AB, Heðin Stenberg.

### Hálvhjartaður fyrri hálvleikur

B68 var greitt oman á í fyrra hálvleiki og tað var Heðin samdur í.

– Toftamenn vóru oman á allan fyrra hálvleik og vit runnu eftir teimum og tað verður tungt í longdini. Vit kundu havt sitið tættari í monnunum, tað virkaði hálvhjartað frá okkara síðu, sigur ein vónsvikin Heðin Stenberg.

### Betri seinni hálvleikur

Í seinna hálvleiki royndi AB at svara aftur, men uttan eydnu.

– Seinni hálvleikur er nógv betri enn fyrri hálvleikur. Vit komu til fleiri innlegg, men manglaðu ein Tehe Aristide at stúta tey í mál. Samanlagt hava vit ikki so nógvar møguleikar, so tað var nokk uppiborið, at B68 vann, sigur Heðin Stenberg.

### Skulu hava trý stig

AB hevur nú seks stig upp til niðurflytingarstrikuna.

– Nú mugu vit bara koyra á, tí tað nyttar so einki at geva upp. Vit mugu venja harðari og so fáa vit at síggja. Vit skulu suður til komandi dyst og skulu hava trý stig, einki annað kann brúkast, sigur Heðin Stenberg at enda.

Komandi dysturin hjá AB er á útivølli ímóti FC Suðuroy, sum saman við AB hevur 10 stig í botninum í Vodafonedeildini.